Kappingareftirlitið

Advokatskrivstovan
Frúutrøð 4
Postboks 6
110 Tórshavn

Att: Niels W. Poulsen, adv.

**Dagfesting:** 17. apríl 2018
**Journal nr.:** 18/00084-5
**Tygara j.nr.:** 20170764
**Viðgjørt:** S.R

**Viðvíkjandi: Avgerð um góðkenning eftir einfaldum leisti**

Kappingareftirlitið fekk tann 9. apríl 2016 fráboðan um, at P/f Smyril Line hevði í umbúna at yvirtaka Sp/f OCD. Fráboðanin var fullfíggjað tann 9. apríl.

P/f Smyril Line yvirtekur virksemi hjá Sp/f OCD, men fyritøkan fer framvegis at halda til í Saltangará og fer at leiga virkisbygningin hjá Sp/f OCD.

P/f Smyril Line hevur virksemi innan farma- og fólkaflutning og gisting. Feløgini hava undan yvirtøkuni havt tætt samstarv um innanoyggja flutning av farmi. Bróðurparturin av umsetninginum hjá Sp/f OCD hevur stava frá flutningi fyri P/f Smyril Line.

Viðkomandi marknaður er innanoyggja farmaflutningur, og er marknaðurin eyðkendur við at lutfalsliga nógvar og fjølbroyttar fyritøkur eru á marknaðinum. Góð atgongd er til marknaðin við tað at íløgan sum skal gerast fyri at byrja virksemi er ikki serliga stór, og sannlíkindini fyri at fáa nakað av íløguni aftur, um royndin ikki eydnast, eru góðar.

Kappingareftirlitið hevur almannakunngjørt, at fráboðan eru komin um yvirtøkuna og hevur sett seg í samband við størri veitarar, kundar og kappingarneytar fyri at fáa teirra viðmerkingar. Kappingareftirlitið hevur móttikið viðmerkingar frá vinnuni.

Kappingareftirlitið metir at yvirtøkan gevur ikki orsøk til ivasemi, og hevur tí valt at góðkenna yvirtøkuna, sbrt. §15, stk. 5 í kappingarlógini.

Góðkenningin er treyta av, at tær upplýsingar sum luttakandi fyritøkurnar hava givið eru rættar, sbrt. §18a, stk. 3 í kappingarlógini.

Vegna
Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
deildarstjóri

Sigurd Rasmussen
fulltrúi

Skálatrøð 20 · Boks 73 110 Tórshavn · Tlf.: +298 356040 · Fax: +298 356055 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo